Lívdin
- í lívd hins hægsta

Mars 2007



# Hjálparhondin

*- ein tænasta í Lívdini*




Hjálparhondin hevur virkað í umleið 5 ár við tí endamáli at skipa praktisku síðuna av umsorganini. Tað vóru Durita Djurholm og Beinta Áargarð, ið stovnaðu Hjálparhondina.

15 fólk eru við í tænastuni, harav bert tveir menn. Tørvur er á fleiri monnum í hesi tænastu. Tað er altíð ein signing at fara út til fólk vegna Hjálparhondina. Fólk taka væl ímóti okkum, tá ið farið verður við onkrum bakstri ella líknandi.

Okkara ynski er, at fólk lata hoyra frá sær, tá ið tørvur vísir seg at vera. Vit fáa ikki vitjað fólk, verða vit ikki kunnað um tørvin, siga Durita Djurholm og Beinta Áargarð, ið hava leiðsluna av Hjálparhondini um hendur. Í fjør vóru samanlagt 32 vitjanir.

---

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85, 90, 95 og 100 ár.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo

## Hjálpararbeiði og missión fylgjast

Hjálpararbeiði og missión eru eitt par, sum altíð hava gingið hond í hond. Hetta var tað, sum eyðkendi lív og læru Jesusar. Vit lesa í Matteus 9:35-36 at, "Jesus ferðaðist nú um í øllum støðum og bygdum, lærdi í sýnagogum teirra, prædikaði evangelium ríkisins og grøddi hvørja sjúku og hvønn veikleika. Tá ið Hann sá fólkið, tykti Honum hjartaliga synd í teimum; tí tey vóru illa hagreidd og vanrøktað sum seyður, ið ongan hirða hevur." Lív Jesusar eyðkendist av einum boðskapi um frelsu, frið og frælsi, samtíðis sum hann var latin í umsorgan, umsjón og kærleika. Bøn mín er, at vit í Lívdini taka lív og læru Jesusar til okkara og byrja at fylgjast við hesum parinum, sum hevur verið til so stóra signing fyri so mong – at prædika evangeliið og at veita menniskjum eina hjálpandi hond.



*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við føðingardegnum

**Símun Absalonsen 50 ár**

Týsdagin 2. januar 2007 fylti Símun Absalonsen í Havn 50 ár. Símun er klaksvíkingur, men hann hevur búð meginmartin av lívi sínum í Havnini. Hann arbeiðir sum løggildugur grannskoðari.

Símun er eitt nú kendur fyri at hava verið íðin í at taka lut í almenna kjakinum, ikki minst tá ið tað hevur snúð seg um sjónarmið viðvíkjandi átrúnaði og vísund. Hansara greiði og áhugaverdi talumáti og góða innlit í skriftirnar, hava vit í samkomuni notið gott av, og vit vilja her takka honum fyri tað.



Símun er giftur Randi, f. Gunnarsson, úr Havn. Tey búgva á Norðasta Horni og eiga trý børn – Brynhild, Mirjam og Trygvi.

## Tillukku við hjúnabandinum

**Hildigerð og Eyðun gift**

3. nov. 2006 giftust Hildigerð Priess, Hoyvík, og Eyðun Nysted Nygaard, Saltnes. Tey vórðu vígd av Heðini Mortensen, borgarstjóra, og 4. november var vælkomst á Brekku.



Tey búgva Inni á Gøtu, til nýggja íbúðin Undir Gráasteini verður klár. Saman eiga tey sonin Teitur, sum er 1 ára gamal.

## Tillukku við barninum

30. januar fingu Lena Nybo Hvítklett og Hjalti Hvítklett í Hoyvík eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

## Heilsan frá Shino og Hallur Mortensen

Samkoman hevur fingið eina heilsan frá Shino og Hallur Mortensen. Shino Kadotani úr Atsugi í Japan og Hallur Mortensen úr Hoyvík giftust 8. juli 2006 í Tokyo.

Tey siga soleiðis í heilsanini til Lívdina: Vit búgva nú í Glasgow í Skotlandi. Shino, sum er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur, lesur nú guðfrøði á "International Christian College", har sum Hallur eisini hevur lisið í trý ár. Tað hevur gingist henni væl higartil. Hon ætlar sær at lesa har í tvey ár.

Eg (Hallur) hevði roknað við at verða noyddur at arbeiða fulla tíð hetta árið. Men við Harrans hjálp bleiv tað møguligt í síðstu løtu hjá mær eisini at kunna lesa fulla tíð.

Vit búgva umleið 10 minuttir frá skúlanum og plaga at ganga ella súkkla í skúla. Íbúð okkara liggur sera væl fyri, innan 20 minuttur kunnu vit ganga til miðbýin í Glasgow. Har eru t.d. tvey

# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3
(bygningurin aftan fyri MBM)



*Á Brekku 3*

Undirvísing og “bøn og bønarskúli”  týskvøld kl. 20.00
*(Triðja hvørt týskvøld eru húsbólkar)*

| | |
|---|---|
| 6. mars. | Evni: ”Mynstur fyri bøn”. *Talari: Jógvan Zachariassen.* |
| 13. mars. | Húsbólkar |
| 20. mars. | Evni: ”Bøn sum flytur fjøll.” *Talari: Jógvan Zachariassen.* |
| 27. mars. | Evni: „Pínan, tá bøn ikki verður svarað“. *Talari: Jógvan Zachariassen* |

| | |
|---|---|
| mik. kl.18 | Bønarløta fyri ung |
| frí. kl. 20.30 | Ungdómsmøti |

## Lívsdroparnir
- tiltak fyri børn frá 1. til 10. flokk

**Mánadag:**

| | |
|---|---|
| Børn og ung frá 1. til 5. flokk: | kl. 16.45-19.00 |
| Børn og ung frá 6. til 10. flokk: | kl. 17.45-20.00 |

## Frá ljóðbólkinum

Tørvur er á fólki til ljóðbólkin í Lívdini. Áhugað kunnu venda sær til Árna Hansen, tel. 229894 ella Svend Åge Drewsen tel. 210328.

## SMS-skipanin hjá teimum ungu

Um tú vilt vera við í SMS-skipanini hjá teimum ungu í Lívdini, skriva so: „Liv ung tilmeld“ (síðan títt fornavn og eftirnavn) . Send til: 591901

## Fólk til sunnudagsskúlan

Sunnudagsskúlin sóknast eftir fólki til at undirvísa børnum. Hevur tú hug at vera við í hesi týdningarmiklu tænastu, hvørs endamál er at vinna børn og ung fyri Harran, kanst tú venda tær til Beintu Áargarð á tel. 312655 ella teldupost: aargard@kallnet.fo

Í sambandi við at sunnudagsskúlin heldur til í fimleikarhøllini, verður gjørt vart við, at børnini ikki mugu vera inni í høllini í skóm. Skilagott hevði verið at havt okkurt heitt at latið seg í um føturnar, tá gólvið stundum kann vera eitt sindur kalt.

ymisk universitet, største sjúkrahúsið í býnum, ein sera stór sølumiðstøð, loppumarknaður og kinesiskir matvøruhandlar.

Vit hava trivist væl higartil og vænta, at Harrin fer at brúka hesa tíðina at mynda okkum og fyrireika okkum til tænastu fyri Hann.

Harrans signing til tykkum øll. Tað var stuttligt at síggja mong av tykkum um jólini.

*Shino og Hallur Mortensen*



## Tit skulu vera vitni míni

Á hemasíðuni hjá Lívdini finnur tú nýggja leinkju, ið er nevnd Missión. Leinkjan "Missión" skal skiljast í breiðasta nýtestamentliga týdningi sambært Apostlasøguni 1:8, har sagt verður: "... og tit skulu vera vitni Míni, bæði í Jerúsalem og í øllum Judea og Samaria og líka til enda jarðarinnar", eisini sagt soleiðis, vitni Hansara í nærumhvørvinum, ella heilt úti í ættarbólkunum langt burturi.

Vit koma at frætta frá trúboðarum, stutt sagt, ein kunning um alt, ið hevur við trúboðan at gera. Eisini, tá ræður um "missión" her heima. Ein av leinkjunum er nevniliga "Hvussu eg kann leiða ein persón til Harran", har vegleiðingar verða givnar, hvussu hetta kann gerast.



Mest av øllum skal leggjast dentur á "Bønarstundina", har vit verða kunnað um bønarevni, sum hava eitthvørt við missión at gera. Lukas 10:2 sigur: "Hann segði við teir: "Skurðurin er stórur, men arbeiðsmenninir eru fáir; biðið tí Harra skurðarins senda út arbeiðsmenn til skurð Sín!"

www.livdin.fo - Missión.

*Ólavur Jøkladal*

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 4. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Glóðin.*<br>*Talari: Elin, Hanna & onnur.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 11. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Trúfesti.*<br>*Talari: Eiler Eysturtún.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið.*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 18. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Spakføri.*<br>*Talari: Absalon Áargarð.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Visiónsmøti & at geva.*<br>*Fyriskiparar: Leiðslan.* |

### Sunnudagin 25. mars

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Ávøkstur Andans: Fráhald.*<br>*Talari: Símun Absalonsen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ein ferð í lovsongsmøti.*<br>*Talari: Anna Háberg.* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*